

*Brian McFadden er ein maður við báðum beinum á jørðini, hóast nógva undanvindin á yrkisleiðini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# – Havi eg onki at bjóða eri eg fokin beinanvegin

**- Familjan bukaði meg skjótt á pláss, um eg misiti fótafestið av øllum undanvindinum, segði ein fattur, men fryntligur Brian McFadden, tá hann hitti fjølmiðlafólk, eftir at hann var komin til Føroya hóskvøldið. Áhoyrarar á Summarfestivalinum kunnu vænta sær eini tvey løg frá tíðini í Westlife, men annars er tað nýggja tilfarið, sum er á skránni**

SUMMAR FESTIVALUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Summarfestivalurin er um at byrja og bæði Brian McFadden og Shakin' Stevens komu til Føroya hósdagin og hóskvøldið hittu teir føroysk fjølmiðlafólk.

Tað var ein fattur, men fryntligur McFadden, ið settist við borðið á Hotel Føroyum hóskvøldið. Og eisini føroysku tíðindafólkini tóktust heldur blúgv fyrstu løtuna, írska heimsstjørnan var komin innar.

Men hann legði so bara fyri sjálvur og greiddi frá, at hann var glaður fyri at vitja í Føroyum og at honum dámdi væl vakra landið, sum hann helt minti nógv um Írland.

Spurdur, um hví hann sum heimsstjørna hevur tikið sær tíð til at koma hendavegin, segði McFadden, at hann hevur ikki verið her áður og vildi tí fegin uppliva Føroyar. Og fólk her hava stuðlað honum, teimum dámar tónleikin og vilja tí fegin hoyra hann.

## Nýggj byrjan

Brian McFadden hevur havt eitt stórt hitt saman við unnustuni Delta Goodrem. Henni varð eisini spurt eftir á tíðindafundinum hóskvøldið, men hon er ikki við á ferðini í Føroyum, tí hon er í USA á lýsingarferð fyri næstu fløguna hjá sær.

Á Summarfestivalinum verða eini tvey løg frá tíðini í Westlife at hoyra, men restin er nýtt tilfar og er í stóran mun skráin, ið Brian McFadden hevur verið á ferð við nú í eina tíð.

McFadden trívist væl, nú hann er farin úr bólkinum Westlife og er farin solo.

- Eg eigi avgerðirnar sjálvur, men eisini ábyrgdina og her eru so heldur ikki rúm fyri mistøkum. Men hetta er ein blonk síða og ein púra nýggj byrjan. Í Westlife skrivaðu onnur sanginar og ge kendi meg meira sum ein, ið bert sang, sigur Brian McFadden.

## Heppin

Um orsøkina til undanvindin og hittini sigur McFadden, at hann hevur verið heppin, tí hann er bara ein, ið roynur at skriva sangir. Nógvir av sangunum snúgva seg um tað, ið fer fram í persónliga lívi hansara, men nógv broytist í hesum døgum í lívi hansara, so sangirnir snúgva seg eisini um ymisk evni og ein støðug menning er.

- Men eg vildi ikki bara fylgja leiðini hjá Westlife. Eg vidli ráða sjálvur og fylgja hjartanum, sigur 24 ára gamli Brian mcFadden, sum í dag er glaður fyri sítt lív og hann sigur seg í dag vera væl fyri og fullan av jaligari orku.

## Ongin afturkoma við Westlife

Hann metir, at hinir limirnir í Westlife hava somu evnir og møguleikar at koma fram sum sjálvstøðugir sangarar, tí teir eiga eisini evnini at skriva sangir og allir eru sera góðir sangarar.

Hann metir tó tíðina í Westlife sum tey bestu 7 árini í lívinum. Men spurdur, um upprunaligi bólkurin Westlife nakrantíð kemur saman aftur sigur hann fyrst nei, men dregur so skemtandi í land.

- Nei, ongantíð aftur Westlife. Men kanska um vit allir eru 40 ár og ikki eiga eina einastu krónu. Tá hevði ein afturkomutúrur kanska komið upp á tal, smáflennir McFadden.

## Familjan er akkerið

Brian McFadden er ein maður við báðum beinum á jørðini, hóast nógva undanvindin á yrkisleiðini.

- Eg haldi tað var annað árið við Westlife, at eg líkasum byrjaði at missa fótafestið. Men tá var familjan skjót og bankaði meg skjótt uppá pláss. Og so visti eg beinanvegin, at eg bara var heppin og tað sama kundi staðið í Buger King og arbeitt, sum mínir javnaldrar. Nei, eg eri bert heppin og royni bara at skriva sangir. Men eg haldi yvirhøvur írskar stjørnur klára seg væl í so máta og kanska er tað júst av tí orsøk, at familjutilknýtið er so sterkt, sigur Brian McFadden.

- Eg eri ikki ein teirra í hesum yrkinum, sum hevur eina on/off kontakt, men eg royni at vera ærligur. Men fyrr bar til at gera okkurt býtt ella kanska onki gera ella bara at hava ein ringan dag, tí vit vóru fleiri. Nú eri eg einsamallur, og tað er nógv harðari, heldur McFadden.

Hann hevur onga hóming av, hvar hann er um 10 ár.

- Tað er júst tað eg elski við tónleikavinnuni. Ein veit onki um framtíðina, men havi eg onki at bjóða, so eri eg fokin beinanvegin.

Fleiri av sangunum hjá sær skrivar Brian McFadden saman við navnframa sangskrivaranum Guy Chambers. Hetta samstarv fegnast hann um og hann metir og vónar, at Chambers eisini kemur at hava ein fingur við í spælinum, tá næsta McFadden fløgan kemur út.

Brian McFadden varð at enda á tíðindafundinum hóskvøldið spurdur, hvørjum tónleiki hann sjálvur lurtar eftir og hámetir.

Svarið er einfalt, at rapp og tað í líkist tí, er ikki tað, ið Brian McFadden setir á eina huganliga stund, men heldur er tað Elvis Presley, Guns'n Roses, Eva Cassedy, Ray Charles og mong, mong onnur, ið dámligi írin við góðu røddini setir í fløguspælaran, tá hann skal hugna sær við tónleiki.

Magni Christiansen:

# Føroya stø

**- Shakin´ Stevens er høvuðsorsøkin til, at eg yvirhøvur fór at spæla tónleik, og eg havi keypt allan tann tónleik hjá Shaky, sum eg yvirhøvur havi kunnað fingið hendur á, sigur Magni Christiansen, sum var sera fegin um at møta manninum, ið hevur givið honum íblástur gjøgnum árini**

FJEPPARI
*Stefan í Skorini*
*stefan_skorini@hotmail.com*

- Hello, my name is Magni Christiansen, and I am your biggest fan in the Faroes.

Hetta er heilsanin, ið Shakin´ Stevens fær, tá Magni endiliga sleppur at taka í hondina hjá síni stóru fyrimynd innan tónleikin.

- Hetta var ein stór løta fyri meg í kvøld, og eg var bleytur í maganum frammanundan, tí eg havi lurtað eftir hansara tónleiki alt mítt lív, sigur Magni Christiansen um sín fyrsta fund við ta stóru ungdómsfyrimyndina.

## Fjepparin

Millum ein riðil av føroyskum tíðindafólki uppi á Hotel Føroyum hóskvøldið var eisini ein Shakin´ Stevens fjeppari. Hetta var Magni Christiansen úr Kvívík.

Seinnu árini er hann mest kendur fyri at spæla gospel og country tónleik, men í hansara ungu døgum var tað Shakin´ Stevens, ið hugtók tann unga kvívíkingin.

Magni Christiansen hevur eisini lært seg tann tiltikna dansin, sum var vørumerkið hjá Shakin´ Stevens í áttatiárunum. Hetta gjørdist eisini eitt eyðkenni hjá Magna sjálvum, tá hann stóð á palli seinni í tíðini.

Hóast Magni Christian-sen mest hevur gjørt vart við seg við andaligum sangum seinnu árini, spælir hann framvegis løg hjá Shakin´ Stevens á sínum konsertum.

- Eg endi so at siga altíð við einum lagi hjá Shakin´ Stevens, og eg havi eisini altíð dansað tann serliga dansin hjá honum, greiðir Magni Christiansen frá. Hann leggur afturat, at tað riggar avbera væl, hóast hann oftast syngur andaligar sangir.

- Tað er ofta so, at onkur áhoyrari rópar og biður meg spæla Shakin´ Stevens, og tað geri eg eisini, sigur Magni Christiansen,

# Gott gamalt f

**±Shakin´ Stevens fer at borðreiða við teimum góðu gomlu hittunum, tá hann leygarkvøldið verður høvuðsnavnið á Summarfestivalinum í Klaksvík. Hóast hann nærkast teimum seksti hevur hann framvegis nøkur ár eftir í sær**

TÍÐINDAFUNDUR
*Stefan í Skorini*

– Eg fari at geva meg hundrað prosent, sum eg altíð geri, tá eg standi á palli, og vónandi fer áhoyrarunum at dáma tað, tey hoyra, sigur Shakin´ Stevens, tá hann verður spurdur, hvat vit kunnu vænta okkum á konsertini leygarkvøldið.

